Kjak

Bjarki Skúvadal

75% av føroya fólki eyðmýkt og niður-gjørt av orðloysingunum í samgonguni

Bara ein av flokkunum segði undan valinum, at teir ætlaðu at tiðna blokkin, um tey fingu vald til tess. Og um leið ¼ av veljarunum tók undir við hesum. Allir hinir søgdu klárt og týðuliga "nei!" tá teir fingu spurningin, um blokkurin skuldi tiðnast.

Og nú standa vit her u.l. 75% av veljarunum drignir upp á tráð, niðurgjørdir og eyðmýktir. Hetta er eitt tað ljótasta og fúlasta sum gjørt er í føroyskum politikki síðan heimastýrið kom í gildi í 1948. Ein fær tað spýggjandi vaml fyri politikki og teimum fólkunum, sum eru uppi í politikki, stoltleiki, sómi, æra, lyfti og prinsipp, alt verður blakað á bláman, bara ein kann sleppa fram at valdinum, teimum feitu lønunum og ikki at gloyma pensjónunum. Hvussu kunnu vit, sum kenna okkum svikin og hildin fyri rukku hava nakra virðing fyri hesum persónunum? Eg dugi tað ikki!

Sjúrður Skaale sigur seg "virða" avgerðina hjá samgonguni. Hvat meinar Sjúrður við at "virða"?, um so er, so er hann eftir einum hálvum ári snaraður 180 stig, og er vorðin ramur sambandsmaður. Aftur eitt dømi um, hvussu litið ein skal leggja í, hvat politikararnir siga, torvmold í eyguni á okkum bláoygdu, sum hildu at "eitt orð er eitt orð, og ein maður er ein maður". Eg vóni tó, at Sjúrður meinar, at hann fer at "akta" (sjálvt um tað er nóg ringt) boðini frá samgonguni, tó at hann vanvirðir tey.

Vit plaga at flenna, tá vit lesa biddarabrøv, sum føroyingar sendu kongi í gomlum døgum:" vi stakkels, arme, fattige folk udi færø;" men tá var tað ein vissur sannleiki í hesum orðum, sjálvt um tey ikki vóru serliga virðilig. Men at vit í dag niðurgera okkum á sama hátt, er mær púra óskiljandi. Fara niður til Danmarkar at bidda frá teimum, sum skylda per fólk nær um tvær ferðir so nógv, sum vit???? Álvara tos, hvussu lágt vilja vit níga? "Lágt nígur hann, ið høsnareyv vil kyssa", sigur orðatakið. Forestin, hvar skulu danir spara fyri at fáa hasar milliónirnar, sum skulu sendast okkum? Skulu teir fara við plenuklipparanum, ella lata nakrar barnagarðar aftur ella?????????????

Kanska vera danir blíðir og játta biddarunum, tá teir koma, men tað man neyvan vera tí teimum tykir synd í okkum; fyri teir er sjálvandi umráðandi at halda "ríkið" intakt. Tað er ringur stjórnmálamaður, ið ikki vil varðveita ella víðka um ríki sítt. Og hann skal ikki fara í kríggj fyri at vinna sær hetta landið, tað kostar einki blóð, tey selja seg fyri nakrar fáar hundrað milliónir; tað man vera lættasta landvinning nakar hevur hoyrt um.

Annars las eg í bløðunum í gjár, at summir løntakarar í Føroyum vinna meira enn 5 milliónir kr. um árið, tað er nakað tað sama sum ein vanligur slitmaður brúkar eini 22 ár um at vinna (u.l. helvtin av arbeiðsføra lívinum). Man vanligi danin ikki halda tað var eitt virðiligari mið at troytt heldur enn at givið hesum somu ein feitan skattalætta, sum næstan svarar til helvtina av ársløninni hjá omanfyri nevnda slitmanni, sum so sami dani skal endurrinda???

"Spar i skat, skyd en færing!" skrivaðu summi donsk bløð í 90-árunum, tá sjálvskapta kerppan herjaði í Føroyum, og danir hildu, at teir skuldu gjalda ballið; munu hesi orðini aftur fara at síggjast? Tá verður minni stuttligt at vera føroyingur á flatlondum.

Annars kundi ein eisini trivið í hatta horribla skattauppskotið hjá Fólkaflokkinum, sum eftir øllum at døma bara kemur teimum oman fyri nevndu til góðar. Og her er serliga ein flokkur, sum hevur verið stóri orðloysingurin. Teir tríggir, sum manna henda flokkin, eru kendir fyri at taka orð bíbliunnar í stórum álvara, og minnist meg rætt, so er tað at vera orðloysingur ikki høgt í metum í tí bókini.



Dagfinnur Danbjørg

Fólkaatkvøða ella undirskriftsinnsavnan

8 fólkafloksfólk vórðu á løgtingsvalinum vald m.a. við flatskattaskipan á skránni.

Hóast hinir flokkarnir bert vildu smærri broytingar í verandi skattaskipan fyri at lætta um hjá miðal og teim lægru inntøkunum, so arbeiða í løtuni 4 flokkar og 19 tingmenn fyri hesu kollveltandi fólkafloks flatskattaskipanini, sum oysir milliónir inn til tey ríku, meðan hini fáa millum nakað og einki, serliga við øktum kommunuskatti sum fylgi av, at kommunurnar missa inntøkur í samband við skattingina av eftirlønum við inngjald og av øktum vælferðarkostnað, tí núvernadi ríkmannaskattur verður reduceraður í stóran mun.

Hetta líkist eini høgrakollvelting á fíggjarliga økinum, sum ætlanin er at fremja í tí stilla. Eingin skal fáa høvi til at reagera, fyrr enn hann/hon er í felluni, og lúkan er farin fyri.

At vera valdur upp á skattalætta - sum nevnt - og eftir valið at stuðla og fremja kollveltandi flatskattaskipan hevur onki við demokrati, men nógv meira við demagogi at gera.

Tí er alneyðugt, at vit sum vanlig fólk reagera, meðan tíð enn er til tess. Vit, okkara flokkar og feløg mugu beinanvegin fara til verka fyri um møguligt at krevja eina fólkaatkvøðu fyri ella ímóti eini flatskattaskipan ella einari undirskriftsinnsavnan ímóti nevndu skipan.

Tástani kunnu vit á demokratiskan hátt síggja - svart upp á hvítt - hvat fólkið vil.

Kravt má vera, at allur aktivitetur viðvíkjandi íverksetan av eini flatskattaskipan steðgar til úrslitið av fólkaatkvøðuni ella undirskiftsinnsavnaðini fyriliggur.

Gunnar Isfeld

Sambandsgongan

"Leiðin til vøkstur og vælferð" er floksmotto'ið hjá Fólkaflokkinum. Eg ivist ikki í, at nýggja leiðin hjá hesum landi veruliga fer at skapa vøkstur og vælferð hjá summum – ja fleiri fólkum! Men eg haldi ikki at "summi" er tað, sum liggur í floksnavninum, har "fólk" er sentrala orðið.

Hesin traditiónsríki flokkur kallar seg eisini ein "borgarligan tjóðskaparflokk" og gamla navnið, sum teir eftir øllum at døma vilja krógva burtur, sum jú m.a. innihelt "radikalt sjálvstýri" kundi bent á, at vit hava við ein flokk at gera, sum ynskir sjálvræði fyri Føroya fólk – ella ynskti tað.

Men hvat man hesin flokkur halda um sjálvræði, sjálvstýri ella bara fíggjarligt sjálvbjargni í dag?

Í valskrá floksins stendur m.a.

- Vit vilja gera arbeiðið liðugt við nýggjari stjórnarskipan.
- Vit vilja, at vit skulu reka okkara egna uttanríkispolitikk við fullari ábyrgd.

Okey. Men bíða líka. Arbeiðið við nýggjari stjórnarskipan er hildið uppat, nú hesin flokkur kom fram at valdinum!

Hvussu er so við hinum, "okkara egna uttanríkispolitikk", sum fólkaflokkurin vil reka "við fullari ábyrgd"?

Jú tann munandi styrkti Fólkaflokkurin, vit í dag síggja í samgonguni, hevur avtikið Uttanríkisráðið. Hetta var annars júst tann parturin av stjórnarvaldinum, sum fólkafloksformaðurin stóð á odda fyri í seinastu samgongu, sum flokkurin var við í. Hann kann ikki hava havt serliga stórar tankar um hetta aðalráð, tá hetta sum tað einasta bleiv avtikið. Flokkurin annars hevur sambært valskránni aðra áskoðan hesum viðvíkjandi, sum vit sóðu omanfyri.

Men uttanríkisviðurskifti eru helst í góðum hondum nú undir sambandsformansins leiðslu. Sambandsflokkurin hevur annars verið ein tann minst ídni flokkurin, tá prát hevur verið um henda førleika – uttanríkisviðurskifti.

Sjálvbjargni

Um vit taka ein av fólkafloksins løgtingsmonnum, Jógvan á Lakjuni, so sigur hann um fíggjarligt sjálvbjargni og blokkstuðul:

"Tá ið vit nú upp í saman hoyra Sambandsflokkin siga, at vit skulu fara niður til Danmarkar at biðja um meira blokk, so haldi eg ikki, at hetta er rætt at gera.

Fyri tað fyrsta er tað at kasta torvmold í eyguni á fólki at billa teimum inn, at um vit senda fólk niður til Danmarkar at biðja um fleiri pengar, so fara danir beinanvegin at gera, sum vit siga.

Danmark hevur í ár dupult so stórt undirskot á fíggjarlógini pr. íbúgva, sum vit hava – og skulu fólk, sum eru verri fyri enn vit, gjalda fyri okkum – hvat er hetta fyri nakað?"

Ja, púra samdur Jógvan. Hvat er hetta fyri nakað?

Hetta er so í øllum førum tað, tit eru farnir í holt við í sambandsgonguni. Móti endanum á hesari grein Jógvans, sum er at finna á heimasíðu fólkafloksins, sigur hann heilt í tráð við valskránna:

"Fólkaflokkurin er ein borgarligur tjóðskaparflokkur og hevur sum stavnhald, at í Føroyum skulu føroyingar ráða."

Og lat meg her undirstrika, at "borgarligur tjóðskaparflokkur" merkir ikki "ein flokkur fyri tjóvar sum verja sína borg", sum mann fær hug til at halda til tíðir, um fylgt verður við í gerðum og útsøgnum fólkafloksmanna.

Nú í seinastuni hava vit frætt, at eisini innanhýsis í Fólkaflokkinum eru tað nakrir borgharrar, sum verja borg. Júmen er tað ikki tað "borgarligur" merkir?